# Ein lagnustund hjá Suðuroynni

*– Samtykkir tingið ikki, at leggja oljuhavnina í Suðuroynni, verður tað neyðugt við milliónum í økisstuðuli seinni, akkurát sum í Sandoynni, sigur Rógvi Thomsen*

ÁKI BERTHOLDSEN



*– Verður oljuhavnin ikki løgd í Suðuroynni, verður tð neyðugt við milliónum í almennari menningarhjálp til Suðuroynna seinni, akkurát sum í Sandoynni á sinni, sigur Rógvi Thomsen, næstformaður í Suðuroyar Oljuvinnuráð*

– Hetta er ein heilt avgerandi løta fyri framtíðina hjá Suðuroynni.

Rógvi Thomsen, næstformaður í Suðuroyar Oljuvinnuráð, Soc, er ein av teimum mongu, sum alspent bíða eftir, at tingið nú aftur fer at viðgera oljumálið.

Hóast nógv mál eru til viðgerðar í tinginum, verður tað uttan iva uppskotið hjá javnaðarflokkinum um at oljuhavn skal vera í Suðuroy, sum fer at stjala allan áhugan.

Javnaðarflokkurin hevur skotið upp, at oljuhavnin skal vera í Suðuroynni og næstformaðurin í Soc heldur, at tað er heilt avgerandi at tingið tekur undir við ætlanini.

– Hetta er ein lagnustund hjá Suðuroynni, sigur hann bart út.

Rógvi Thomsen sigur, at samgongan hevur sett sær fyri at bøta um livilíkindini í útjaðaranum.

Men fólkafundurin í Fugloy í summar er eitt dømi um, hvussu seint alt gongur, tí tað varð samtykt at seta eina útoyggja nevnd.

Men hon er ikki sett fyrrenn akkurát nú.

So verður hetta gongdin, er tað ilt at meta um, nær vit fáa nakað úrslit haðani, sigur næstformaðurin í Soc.

Hinvegin heldur hann, at tinglimir kunnu geva suðuroyingum eitt veruligt skump beinanvegin við at samtykkja, at oljuhavnin skal vera í Suðuroynni, hóast ein tíð gongur, áðrenn virksemið verður.

– Verður oljuhavnin løgd í Suðuroynni, fer tað at loysa ein stóran, samfelagsligan trupulleika.

– Tí í Suðoynni er alt ov lítið arbeiðið. Og verður oljuhavnin løgd í Suðuroy verður lagt upp fyri enn størri fráflyting, tí tá verður meiri arbeiði.

Ikki minst hugsar Rógvi Thomsen um tey ungu fólkini við útbúgving, tí í oljuvinnuni verður brúk fyri fólki við nógvum ymsum útbúgvingum, so hetta er eitt høvi at geva teimum møguleikan at blíva verandi í Suðuroynni ístaðin fyri at flyta.

Hinvegin er so hart trýst á arbeiðsmarknaðinum í miðstaðarøkinum, at hann tolir ikki eina stóra vinnu afturat, uttan at tað fer at føra til ógvusligar príshækkingar.

### Vilja sleppa frá

Næstformaðurin í Soc leggur afturat, at oljufeløgini hava greitt boðað frá, at sjálvi vilja tey helst sleppa undan at gera av, hvar oljustøðir skulu vera í teimum londum, tey arbeiða í.

– Sostatt hevur løgtingið nú eitt frálíkt høvi til at fáa tvey fyri eitt: Tí við at samtykkja, at oljuhavnin skal vera í Suðroy, gongur tingið bæði oljufeløgunum á møti og bjargar samstundis einum stórum útjaðara undan hóttafalli.

Hann er vísur í, at verður oljuhavnin fyrst løgd á Sundi, ella í Runavík, verður hon aldrin flutt aftur.

Somuleiðis eru hann vísur í, at fáa suðuroyingar ikki oljuhavnina, verður tað neyðugt at spræna milliónir í Suðuroynna í menningarhjálp, akkurát sum tað var neyðugt í Sandoynni fyri nøkrum árum síðani.

– Men verður oljuhavnin løgd í Suðuroynni, er tað hinvegin óekeypis menningarhjálp.

Hann vísir eisini á, at í Suðroynni er tann fyrimunir, at har eru tveir firðir, sum at kalla er til reiðar at taka ímóti oljuvinnuni. Og á Tvøroyri eru enntá tvær havnir.

Hann kann fyri so vítt taka undir við, at løgtingið tekur undir við eini neyðsemju um, at oljuhavnin skal vera í útjaðaranum, uttan at nevna øki.

– Men so veldst um, hvat løgtingið meinar við útjaðara. Verður Sund og Runavík tald uppí útjaðaraøkini, kann tað gera akkurát tað sama. Men verður talan um tann veruliga útjaðaran, stendur Suðuroyggin sterk, sigur Rógvi Thomsen.

---

*Sjómenn eru ósamdir við Poul Mohr:*

# Norrøna mátti rýma av Sundi

*Havnin á Sundi er so ókyrr, at Norrøna vildi ikki liggja har longur, og hon hevur nú ligið í Havn eina tíð*

ÁKI BERTHOLDSEN




*Nú vit tosa um oljuhavnir: Havnin á Sundi er so ókyrr, at Smyril Line vil ikki brúka hana longur. Norrøna rýmdi herfyri á Havnina og har hevur hon ligið síðani. Men nú er plásstrot í Havn so hon noyðist innaftur á Sund. Skal havnin á Sundi.*

– Sum havnin á Sundi er í løtuni, er hon ikki nóg góð.

– Eitt nú mátti Norrøna herfyri rýma av Sundi og hon hevur nú ligið á Havnini burturav síðani tá.

Sjómenn er samdur við Poul Mohr, stjóra á Skipasmiðjuni í Havn, og oddamaður í felagnum, sum ætlar at gera oljuhavn á Sundi.

Í Sosialinum í gjár vísir hann á, at tað er nógv betri at gera oljuhavn á Sundi enn í Runavík, ella á Drelnesi.

M.a. vísir hann á, at í illveðrinum leyardagin vóru tað fín líkindi á Sundi, ímeðan tað var so ringt veður í Runavík, at skipini máttu rýma haðani, og Smyril ikki fekk lagt at á Drelnesi.

Vit hava spurt tveir sjómenn, sum hava rættiliga drúgar royndir, bæði á Drelnesi og á Sundi, um teir eru samdir við Poul Mohr.

Tað eru teir ikki

### Slitu tríggjar endar

Tann fyrri, vit hava spurt, er bátsmaðurin á Smyrli, Erland Jacobsen, ið hevur so nógvar royndir sum ongin annar, bæði á Trongisvágsfirði og í Havn.

Hann hevur siglt við Smyrli í 30 ár og hevur sostatt verið yvir 20.000 ferðir í Havn og á Tvøroyri.

Og hann kann yvirhøvur ikki taka undir við Poul Mohr, í hansara atfinningum at Drelnesi.

– Víst ber tað ikki til at liggja á Drelnesi altíð, minni enn so, sigur hann.

– Men vit hava so tann fyrimunin á Tvørafjørði, at er tað ikki ligjandi á Drelnesi, ber altíð til at fara yvir á Tvørakei, tí vit hava tvær havnir á fjørðinum. Og kann onnur ikki brúkast ein dag, kann hin, sigur hann.

Og hann leggur afturat, at leygardagin royndi Smyrli yvirhøvur ikki at leggja at á Drelnesi. Tað var óneyðugt, tí at hann altíð hevur møguleikan at leggja seg á tvørakei, tá ið tað ikki eru líkindi á Drelnesi.

– Og so kundi Poul Mohr eisini fortalt Sosialinum, at leygardagin sleit Smyril tríggjar endar inni í keihylinum í Havn. So viðurskiftini høvuðsstaðnum eru ikki frægari enn so, skoytir hann uppí.

– Men, hvar finnur tú læ í ódnarveðri, spyr bátsmaðurin á Smyrli.

– Tó skal eitt vera vist. At kemur tú inn á Vágsfjørð ella inn á Trongisvágsfjørð, liggur tú trygt.

Tað sama heldur hann ikki kann sigast um Sund, tí tað er vælkent, at har er brimpláss.

– Ístaðin fyri at úttala seg um slík viðurskifti, skuldi Poul Mohr heldur hildið seg til tað, sum hann dugir heilt framúr, og tað er at smíða skip, sigur Erland Jacobsen.

### Mátti rýma

Hin sjómaðurin, vit hava tosað við, er Ólavur Hovsgarð, yvirmaður á Norrønu, sum hevur ligið heilt nógv á Sundi.

Men heldur ikki hann heldur, at havnin á Sundi er nakað at reypa av.

– Sum hon er í løtuni kann hon yvirhøvur ikki brúkast.

– Verður hon bygt út, ivist eg ikki í, at tað kann fáast ein góð havn á Sundi.

– Men tað kann mann fáa so nógva aðrastaðni eisini, leggur hann afturat.

– Men sum er ber tað slett ikki til at brúka havnina á Sundi, tí hon er so ókyrr.

Hann sigur, at tað suðar rættiliga illa at liggja á Sundi.

Og Norrøna hevur so ringar royndir av Sundi, at teir rýmdu herfyri og løgdu seg á Havnina fyri well.

–Tað, sum fekk bikarið at flóta yvir, var einaferð teir høvdu bundið Norrønu við bryggju á Sundi og sløkt motorarnar.

Men tað bar yvirhøvur ikki til at liggja har og ta einu ferðina fekk hon ein slíkan sendara inn ímóti keiini, at hon fekk fleiri buglur.

– Tá rýmdu vit á Havnina at liggja og noktaðu at fara aftur á Sund at liggja.

Sostatt hevur Norrøna ikki ligið á Sundi eina tíð.

Ólavur Hovsgarð sigur, at beinanvegin hann kemur eysturum, og fjørðurin verður opin aftur, er tað ikki liggjandi á Sundi.

Og teir hava eisini slitið fleiri endar, sum eru navaðir av, sum tað hevur suðað.

Teir hava eisini gjørt tveir eyka fendarar til Norrønu, men tveir av teimum eru loysnaður aftur.



*Strandferðslan í andaleypi:*

# Tingmenn vita ikki hvat teir hava við at gera

*Henrik Old, løgtingslimur heldur, at tingmenn eru ábyrgdarleysir, tá teir viðgera strandferðsluna verður viðgjørd. – Stovnurin liggur í andaleypi, men fær hvørki størri játtan ella loyvið til at hækka ferðaseðlaprísirnar og samstundis er bundin at óbroyttum tænastustøði, sigur hann*

SVEINUR TRÓNDARSON



*– Strandferðslan liggur í andaleypi, tí tingmenn ikki vita hvat teir hava við at gera, sigur Henrik Old*

Tá fíggjarlógin var til viðgerar í tinginum kom fram, at Strandfaraskip Landsins ikki fer at klára seg við ta játtan, sum stovninum var tillutað. Tí bað landsstýrismaðurin í vinnumálum um loyvið til at hækka ferðaseðlaprísirnar, men heldur ikki tað vann frama.

Tí varð støðan tann, at Strandferðslan hevði fingið fleiri uppgávur og nógv færri pengar at loysa hesar uppgávur. Í nøkrum førum letur hetta seg kanska gera, men í hesum førinum er tað ómøguligt. Tað heldur Henrik Old, tingmaður fyri Javnaðarflokkin, í hvussu er.

Hann heldur heilt einfalt, at tað ber ikki til at loysa uppgávuna, sum leiðslan á Strandferðsluni hevur átikið sær.

– Leiðslan er bundin á hond og fót. Útreiðslurnar eru hækkaðar nógv, og tað eru útreiðslur, sum leiðslan á stovninum einki fær gjørt við. Oljuprísirnir eru tvífaldaðir, havnagjøldini og vørugjøldini eru hækkað við seks milliónum og samstundis eru lønirnar hækkaðar við 6,5 prosentum, og einki av hesum fær Strandferðslan gjørt nakað við, sigur Henrik Old.

Men tað er ikki alt, vísir Henrik Old á. Strandferðslan er bundin av manningarlógini, sum áseta hvussu nógvir mans skulu vera við hvørjum skipið fyri at tað skal fáa loyvið at sigla, samstundis, sum tingið hevur sagt, at tænastustøðið hjá stovninum skal ikki lækkað.

– Hetta hongur yvirhøvur ikki saman. Leiðslan á stovninum fær einki gjørt tí trygdarkrøvini eru ófrávíkilig, og tað sama má sigast um treytirnar frá tinginum, og tí hevur leiðslan á stovninum fingið eina uppgávu, sum frammanundan er óloysilig.

### Tingmenn óvitandi

Men hvør er so orsøkin til hesa miseruna, sum Strandferðslan er komin í?

– Fyri mær liggur ábyrgdin serliga hjá fíggjarnevndini, hjá tinginum og partvís eisini hjá fíggjarmálastýrinum. Landsstýrismaðurin í vinnumálum og leiðslan á stovninum hava greitt boðað frá, at tað fer ikki at hanga saman hjá teimum í ár, um teir ikki fáa størri játtan, og tí ber ikki til at lasta teimum fyri nakað.

– Eg haldi, at tað vísir bara, at tingmenn og fíggjarmálastýrið hava ikki ánilsi um hvat teir gera, tá teir viðgera Strandferðsluna. Teir seta bara treytir uttan at hugsa um manningarlóg og trygdarkrøv, og tað ber heilt einfalt ikki til, sigur Henrik Old.

Sum dømi nevnir Henrik, at skal fólk sigast upp á Strandferðsluni - fyri at játtanin skal røkka - so má hetta gerast á landi, tí tað ber ikki til at siga teir sum sigla upp uttan at skipið verður lagt.

– Manningarlógin ásetur hvussu stór manningin skal vera fyri at skipið skal kunna sigla, so har er einki at gera. Men eg ivist í um tingmenn eru greiðir yvir tað. Somuleiðis er við trygdarkrøvunum. Men eg loyvi mær eisini at ivast í, um tingmenn eru greiðir yvir tað heldur, sigur hann.

### Uppgávan deyðadømd

Tá fíggjarlógin er til viðgerar eru altíð tingmenn, sum gera seg til forsprákarar fyri sparingum - hesum slepst ikki undan, men í hesum førinum heldur Henrik Old, at tingmenn hava víst ov stóra sparigleði uttan at vit hvat teir hava við at gera.

– Tað verður arbeitt uttan at kenna umstøðurnar hjá stovninum og í grundini eisini uttan at vita hvussu samferðslan í Føroyum skal síggja út framyvir. Eg haldi, at tingið átti at viðgjørt samferðsluna alla sum hon er, tí so høvdu allar upplýsingar um stovnin og teirra arbeiðsviðurskifti komið fram, og so vistu tingmenn hvat teir hava við at gera, sigur Henrik.

Hann vísir á, at tað er gamaní at áleggja einum stovni at spara pening, men tað skal kortini vera samanhangur í tí, sum ein krevur og sum ein gevur.

– Sum støðan er í løtuni er uppgávan hjá Strandferðsluni deyðadømd longu áðrenn farið er undir hana. Teir kunnu sikkurt spara nøkru hundrað túsund við at siga fólki upp á landi, men tað verður ikki nóg mikið til at fáa endarnar at røkka saman allíkavæl, sigur Henrik.

### Hanga ikki á trøunum

Fyri tíð síðani segði Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni, at endin av øllum hesum kann gerast, at hann verður noyddur at leggja skip. Fær hann ikki pengarnar ber ikki til hjá honum at hava tænasturnar, sum tingið krevur, gangandi, og so mugu skip leggjast.

Og Henrik Old skilir væl støðuna hjá Reidari.

– Hann hevur reiðaraábyrgd, og kann leggja skipini. Tak t. d. Smyril, sum skal til eina størri yvirháling um stutta tíð. Stovnurin hevur funnið eitt egnað skip, men av tí at tingið hevur forsovið seg, eru teir noyddir at lata tað av hondum. Teir hava røkt sína uppgávu og funnið eitt egnað skip, men tá teir ikki hava peningin, er hopleyst. Hvat skulu teir gera, spyr Henrik Old.

Hann vísir á at tað fer at vera kaos um einki skip verður fingið ístaðin, tí so verður eingin sigling til Suðuroynna - í ringasta føri.

– Men hetta er bert enn eitt dømi um hvussu skilaleyst tað heila er í hesum sambandi og endin verður uttan iva, at tað skal ein eykajáttan til fyri at fáa alt at hanga saman. Ein eykajáttan, sum kemur fyri tingið áðrenn blekkið á fíggjarlógini er turt og sum skal viðgerast av teimum, sum fyrr søgdu nei til eykajáttan. Skil tað hvør ið vil. Men her er púrt einki skil í, sigur Henrik Old.

---

# Uppgávan er ómøgulig

*Tekniski stjórin á Strandferðsluni er tann, sum best veit hvørjum standi skipini í teirra flotan eru í, og hann sigur, at uppgávan er ómøgulig at loysa undir verandi umstøðum*

SVEINUR TRÓNDARSON

Strandferðslan er rættiliga í brennideplinum fyri tíðina. Játtanin hjá stovninum fer ikki at halda um ikki eitthvørt ógvusligt verður gjørt, og møguleikarnir hjá stovnsleiðuni er avmarkaðir.

Manningarlóg, trygdarkrøv og tænastukrøv frá tinginum leggja sína tungu hond á leiðsluna soleiðis, at sparingarmøguleikarnir fækkast.

Í hinum borðinum er veruleikin óreingiligur, og hann staðfestir, at skipini hjá stovninum í fleiri førum eru niðurslitin - koyra upp á pumpurnar, so at siga.

Nógv er at gera við skipini, men peningur er eingin tøkur at gera nakað við, og endin kann verða, at skipini vera løgd. Og tekniski stjórin á stovinum staðfestir veruleikan.

– Uppgávan er - sum hon er nú - fullkomiliga ómøgulig at loysa. Fara vit ikki væl um skipini, so tori eg ikki at hugsa um avleiðingarnar, sigur Magnus Magnussen.

Hjá honum er veruleikin tann, at Smyril skal í dokk um ikki so langa tíð, og hann skal standa leingi, tí nógv er at gera við hann. Afturat tí kom so - meiri ella minni óvæntað - at motorurin á Pride segði, at nú var nóg mikið, og har skal støða takast til, um hann skal umvælast ella um tað loysir seg.

– Motorurin á Pride er gamal og kostar nógv at umvæla tí alt sum skal gerast skal »specialgerast«. Og við tí fáa vit fleiri trupulleikar. Loysir tað seg, hvat ætlað vit við Pride og hvar finna vit peningin eru nakrir teirra, sigur Magnus, sum heldur støðuna vera ótolandi.

Og eins og Henrik Old heldur Magnus, at tað í grundini stavar frá tí at tingmenn ikki vita hvat mann vil tá peningurin verður játtaður.

### Nei til Alandiu

Sum fyrr greitt frá í blaðnum hevur leiðslan á Strandferðsluni funnið egnað skip til at avloysa Smyril, men av tí at peningur ikki var tøkur til tað leigumálið hevur stovnurin boðað eigarunum av Alandiu frá, at teir ikki fáa gjørt ein sáttmála. Og tað merkir, at einki skip er funnið at avloysa Smyril.

Hvussu tann trupulleikin nú skal loysast veit Magnus ikki, men hann veit í hvussu er, at tað verður ikki stuttligt at vera á Strandferðsluni tá.

– Tað er púra greitt, at vit seta ikki spurnartekin við trygdarkrøvini, og tey skulu haldast við líka. Gera vit ikki tað, vera tey løgd av eftirlitsstovnum, um vit ikki gera tað sjálvi. Tí má peningur játtast til hesar uppgávur, og eisini til avloysaraskip um so er, at tingið vil hava at tænastustøðið skal vera tað sama, meðan skipini verða umvæld.

Veruleikin er í øllum førum, at øll skipini hjá Strandferðsluni skulu í dokk einaferð um árið í øllum førum. Sum støðan er í løtuni skal Smyril í dokk um ikki so langa tíð, Pride liggur, og eingin veit um hann verður gjørdur aftur og Ternan skal hava nýggjar motorar. Motorskiftið á Ternuni er tað einasta, sum peningur er játtaður til, tí tað var ein játtan fyri seg, greiðir Magnus Magnussen frá.

---

# Fíggjarnevndin onga ábyrgd

*Bjarni Djurholm heldur ikki at fíggjarnevndin hevur ábyrgdina av støðuni hjá Strandferðsluni*

SVEINUR TRÓNDARSON

Bjarni Djurholm, formaður í fíggjarnevnd løgtingsins heldur ikki at fíggjarnevndin kann ábyrgjast fyri støðuna Strandferðslan er í.

– Vit tóku undir við uppskotinum hjá landsstýrismanninum at fíggja meirútreiðslurnar við at hækkað ferðaseðlakostnaðin, men við triðju viðgerð kom uppskotið um at geva eina meirjáttan, sum svaraði til ein ársfjórðing við tí treyt, at ferðaseðlaprísirnir ikki hækkaðu, sigur Bjarni Djurholm.

Fyri at loysa trupulleikarnar hjá stovninum heldur Bjarni kortini at tingið eigur at gera okkurt munagott, og her vísir hann á loysnina við Føroya Tele.

– Tingið eigur at umhugsað eitt alment partafelag, tí tað hevði givið stovninum betri møguleikar at arbeitt, samstundis sum teir kappast við aðrar, sigur Bjarni.

Hann vísir á at umstøðurnar hjá Strandferðsluni minna umtær hjá postverkinum, sum eisini kemur í trupulleikar í heyst verður einki munagott gjørt.